# Sær bjart út fyri leiting við Føroyar

**-Tað sær bjart út fyri leiting á landgrunninum, tí stórur áhugi er fyri føroyska økinum. Tað at vit fáa nógvan seismikk í summar og fáa loyst spurningin viðvíkjandi teimum írestandi brunnunum er sera positivt. Tað ger, at vit koma víðari. Tað at fáa nakrar boringar gjøgnum basaltið er ein ómetaliga týdningarmikil brikkur í framtíðar oljuleiting í Føroyum. So 2006 verður eitt slag av einum vegamóti sigur Sigurð í Jákuppstovu, stjóri á Oljufyrisitingini**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hóast tað ikki verður borað á landgrunninum í ár, so verður stórt seismiskt virksemi í summar á meginpartinum av teimum nýggju loyvunum. Hetta upplýsir Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini. Teir høvdu roknað við, at nakað av seismikki varð skotið í ár og restin næsta ár. Nú sær út til, at heldur meira verður í ár, tí feløgini eru rættiliga áhugað í at sleppa í gongd. Hetta metir hann vera rættiliga positivt.

Tað skulu annars borast fýra brunnar á landgrunninum næsta ár. Talan er um teir írestandi brunnarnar frá 1. Útbjóðing. Loyvini vórðu latin í 2000 og freistin fyri at bora teir gongur út í 2006. Tað hava verið og eru samráðingar millum feløgini sínámillum og við myndugleikarnar um at flyta hesar brunnar til onnur øki á landgrunninum enn tey teir vórðu ætlaðir at bora, nevniliga í landssynnings horninum av landgrunninum, í tí fyrr so nógv umrødda "Gullhorninum". Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tað gongur framá við hesum samráðingum. Teir vænta at hava eina avkláring tíðliga í summar, kanska í juni.

Sosialurin hevur fyrr í metingum av oljutilgongdini gitt, at fleiri av feløgunum helst fara at leggja onkrar brunnar saman og bora teir á basaltøki. Sigurð í Jákupsstovu vil ikki vátta hesar metingarnar men sigur tó, at tær eru á eini leið. Hann váttar tó, at einki av feløgunum sleppur undan at halda sínar boriskyldur. Tað geva loyvireglurnar teimum ikki møguleika til. Har stendur stutt og greitt: "Drill or pay", bora ella betal. Og Jákup í Jákupsstovu leggur aftrat: –Vit leggja dent á at fáa so góða leiting sum gjørligt við Føroyar.

- Og ein góð leiting kann væl eisini merkja, at tit loyva feløgunum at flyta brunnarnar úr sínum loyvisøkjum í onnur øki, har meira sannlíikt er at finna olju og gass!

- Tað kann gott vera ein góð leiting. Tað er ikki vist, at tað loysir seg at bora í næstan sama stað, har borað hevur verið fyrr. Tað kann vera, at tað er betur fyri okkum at royna okkurt heilt nýtt. Eitt nú inni á basaltinum.

### Torført at fáa pallar

Sigurð í Jákupsstovu sigur annars, at tað er sera torført at fáa boripallar í løtuni, og hann vónar ikki, at tað kemur at órógva leitingina við Føroyar. Stóri eftirspurningurin eftir boripallum og her ikki minst teimum, sum kunnu bora á heilt djúpum vatni, er ómetaliga stórur og hetta hevur helst gjørt, at ChevronTexaco, Statoil, Dong og OMV ikki fara at bora ætlaðu avmarkingarbrunnarnar í Rosebank/Lochnagar oljufundinum í bretskum øki, skamt frá føroyska markinum. Stóri eftirspurningurin hevur eisini ávirka prísirnar sera nógv. Har tað fyrr hevur kostað góðar 100.000 dollarar at leiga boripall um dagin, er prísurin í løtuni 300.000 dollarar.

Sosialurin veit annars frá álítandi keldum, at ómøguligt hevur hjá teimum fýra feløgunum í Rosebank-loyvinum at finna ein boripall at bora í summar, og tí er henda boriætlan útsett til næsta summar. Avmarkingarbrunnar beint hinumegin markið kunnu annars fáa stóran týdning fyri framtíðar leiting við Føroyar eisini. Tað verður nevniliga gitt, at tað er ikki óhugsandi, at tað stóra oljufeltið, sum varð funnið í fjør bara fáar kilometrar frá føroyska markinum, heldur fram inn á føroyska landgrunnin eisini.

Sigurð í Jákupsstovu heldur tað vera eitt sindur spell, at hesar boringar ikki verða í ár, men so er bert at vóna, at hetta verður næsta summar. –Um tað kom hartil, at tað var skotin seismikkur hjá okkum í summar og boringar á bretskum øki somuleiðis í summar, so hevði tað verið sera gott fyri okkum sigur hann. Tað má ein so liva við, og tað merkir so bara, at hetta verður eitt sindur útsett. Hinvegin er tað eingin vanlukka, nú vit vita, at nógv seismiskt virksemi verður í summar og brunnar boraðir næsta summar.

Stjórin á Oljufyrisitingini er ikki ónøgdur, eiheldur svartskygdur um framtíðina. Heldur tvørturímóti. Tað liggur í kortunum, at tað verður eitt hampuligt tal av boringum næsta ár, og tað hevði verið gott sigur hann.

Í mai verður stórur kunningardagur í London, har tað verður roynt frá føroyskari síðu at greiða frá møguleikunum hjá útlendskum íleggjarum at gera íløgur í føroyskt vinnulív, her ma. eina møguliga komandi oljuvinnu. Ein av teimum, sum skal greiða frá oljutilgongdini er Sigurð í Jákupsstovu. Hann vónar, at slíkt tiltak kann skapa áhuga fyri Føroyum sum framtíðar oljuland.

Samanumtikið so heldur hann tað sær bjart út, tí stórur áhugi er fyri føroyska økinum. Tað at vit fáa nógvan seismikk í summar og fáa loyst spurningin viðvíkjandi teimum írestandi brunnunum er sera positivt. Tað ger, at vit koma víðari. Tað at fáa nakrar boringar gjøgnum basaltið er ein ómetaliga týdningarmikil brikkur í framtíðar oljuleiting í Føroyum. So 2006 verður eitt slag av einum vegamóti.



*Sigurð í Jákupsstovu vil ikki vátta metingarnar men sigur tó, at tær eru á eini leið*

# ChevronTexaco biðið um útseting

**Eitt av heimsins størstu oljufeløgum, ChevronTexaco fekk tillutað leitiloyvi við Føroyar herfyri. Sambært reglunum skal tað lata upp skrivstovu og finna sær umboðsmann í Føroyum. Felagið hevur biðið sær um meira tíð og fer at fáa hesi viðurskiftini uppá pláss í mai**

OLJUFELØG OG SKRIVSTOVA
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tá nýggj oljufeløg fáa leitiloyvi og gerast fyristøðufeløg – operatørar - við Føroyar eiga tey at fáa sær umboðsmann og skrivstovu í Føroyum. Í sambandi við 2. útbjóðing vóru tað tvey nýggj feløg, sum gjørdist operatørar, nevniliga ChevronTexaco og Geysirpetroleum. Lógin sigur, at feløgini innan tríggjar mánaðir, eftir at tey hava fingið leitiloyvi skullu lúka hesar treytir. Tvs. at tey fyri 17. Apríl skuldu hava funnið sær skrivstovu og umboðsmann. Herfyri boðaði Geysirpetroleum frá, at Høgni Mohr í Havn er settur sum umboðs-maður fyri felagið, og at felagið fyribils fer at halda til í somu hølum sum samstarvsfelagið Atlants Kolvetni, í Nólsoyarstovu í Havn. Men ætlanin hjá feløgunum er at flyta í størri høli í Jónas Bronxgøtu seinni.

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Oljufyrisitingini sigur, at hitti fyristøðufelagið, ChevronTexaco hevur biðið um at fáa nakrar vikur aftrat til at fáa viðurskiftini uppá pláss, og tað hevur fingið fingið játtað. Hann roknar við, at hetta verður avgreitt í mai mánað. Sigurd í Jákupsstovu sær ikki hesa útseting sum nakran trupulleika. Hann roknar við at viðurskiftini koma uppá pláss í næstum. Tað triðja felagið, sum er nýtt í Føroyum , er eysturtýska felagið OMV. Tað er so partur av einum samtaki. Slíkt felag nýtist ikki at hava skrivstovu í Føroyum men skal so hava eina ella aðra postadressu. Á oljufyrisitingini vita tey ikki, hvat felagið hevur fyritikið sær í so máta. Vanliga plaga slík feløg, sum ikki hava leiklut sum fyristøðufelag, at hava ein persón í Føroyum, sum tekur sær av teirra samskifti við myndugleikar oo. Í fleiri førum eru tað føroyskir advokatar, sum umboða tílik oljufeløg.

Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tað teir leggja dent á er at hava onkran at samskifta við í bólkinum, og tað plagar vanliga at vera fyristøðufelagið.